# Fráverutrygd

Hetta er eitt upplýsingarskjal um okkara sjúkurakstrartapstrygging, Fráverutrygd. Hetta skjalið er bert kunnandi og ikki ein fullfíggjað frágreiðing. Avtalugrundarlagið er tryggingarskjalið og galdandi tryggingartreytir. Tryggingartreytirnar eru at finna á **www.trygd.fo**.

## Hvat er Fráverutrygd?

Fráverutrygd tryggjar fyritøkuna, um starvsfólk gerast óarbeiðsfør orsakað av skaða ella sjúku. Fyritøkan velur sjálv, hvørji starvsfólk skulu tryggjast og við hvørjari upphædd. Fyritøkan kann fáa eitt mánaðarligt útgjald úr 10.000 kr. til 50.000 kr., fyri hvørt tryggjað starvsfólk.

### Hvat dekkar tryggingin?

- ✓ Fráveru hjá starvsfólkum, ið gerast óarbeiðsfør orsakað av sjúku ella skaða. Um tryggjað starvsfólk í tínari fyritøku gerast óarbeiðsfør, fær fyritøkan eitt mánaðarligt endurgjald. Tað er møguligt at velja ymiskar tryggingarupphæddir fyri einstøku starvsfólkini.

### Hvat dekkar tryggingin ikki?

- ✗ Tær fyrstu 3 vikurnar av hvørjum tíðarskeiði starvsfólk eru fráverandi vegna óarbeiðsføri.
- ✗ Óarbeiðsføri, sum stendst av sjúku, har sjúkueyðkennini vístu seg, áðrenn tryggingin varð teknað.
- ✗ Óarbeiðsføri, sum stendst av fríðkandi viðgerðum.
- ✗ Óarbeiðsføri, sum stendst av varandi sjúku.
- ✗ Óarbeiðsføri, sum stendst av fyllskapi ella ávirkan av narkotika.
- ✗ Sí annars treytirnar fyri onnur undantøk.

### Avmarkingar

- ! Tað er ein treyt, at fyritøkan hevur havt ein støðugan umsetning í minsta lagi 12 mánaðir áðrenn tryggingin varð teknað.
- ! Tryggingarupphæddin fyri hvønn tryggjaðan á tryggingarskjalinum, kann í mesta lagi vera tann hægra av hesum upphæddum:
  - a) hægri enn 80% av mánaðarliga miðal-umsetninginum hjá fyritøkuni teir seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn tryggingin varð teknað, deilt við talinum av starvsfólkum í fulltíðar starvi í tíðarskeiðnum.
  - b) hægri enn 80% av mánaðarligu miðallønini seinastu 12 mánaðirnar áðrenn fráveruna.
- ! Tryggingin fevnir ikki um óarbeiðsføri vegna sjúku fyrr enn 6 mánaðir eftir, at tryggingartakarin varð fevndur av tryggingini.
- ! Endurgjaldstíðarskeiðið byrjar tríggjar vikur eftir fyrsta sjúkradag og endar í seinasta lagi 12 mánaðir eftir, at óarbeiðsførið byrjaði. Endurgjaldstíðarskeiðið kann sostatt í mesta lagi verða 49 vikur.

## Hvar tekur tryggingin við?

✓ Tryggingin tekur við í Føroyum.

## Hvørjar skyldur hevur tryggingartakarin?

- Tryggingartakarin skal upplýsa navn, adressu og p-tal hjá teimum, ið skulu tryggjast.
- Tryggingartakarin hevur skyldu til altíð at tryggja sær, at Trygd hevur eitt dagført yvirlit yvir tey starvsfólk/fakfelagslimir, ið skulu verða fevnd av tryggingini.
- Tryggingartakarin skal beinavegin boða Trygd frá skrivliga, um fyritøkan:
  1) steðgar virkseminum, 2) ger broytingar í ognarviðurskiftunum, 3) verður umskapað, 4) skiftir bústað.
- Tryggingartakarin skal lesa tryggingarskjalið ígjøgnum fyri at tryggja sær, at tryggingarskjalið, er sum avtalað.

## Nær og hvussu verður tryggingin goldin?

Tryggingartakarin skal gjalda tryggingina í seinasta lagi tann dagin, sum stendur á inngjaldingarkortinum.
Tryggingargjaldið verður kravt inn við inngjaldingarkorti ella, eftir áheitan frá tryggingartakaranum.
Fyrsta gjaldið fellur til gjaldingar, tá tryggingin kemur í gildi. Eftir hetta fellur gjaldið á ásetta gjaldsdegnum.

## Tryggingartíðarskeið?

Gildiskomudagurin sæst á tryggingarskjalinum. Tryggingin verður teknað fyri eitt tryggingarár í senn og verður endurnýggjað av sær sjálvum, um ikki annað er avtalað. Tryggingin fellur burtur av sær sjálvum, tá ið tryggjaði er komin til fólkapensjónsaldur, sambært tað til eina og hvørja tíð galdandi lóggávu um almannapensjónir.

## Hvussu verður avtalan uppsøgd?

Tryggingin kann sigast upp av báðum pørtum við eini freist á 30 dagar til eitt høvuðsforfall.